# Tagnaðarskylda

Býráðs- og nevndarlimir hava tagnaðarskyldu um trúnaðarupplýsingar, sum teir gerast kunnugur við í samband við innlit í tilfar um mál, luttøku á fundum ella á annan hátt.

Hetta merkir, at upplýsingarnar mugu ikki berast víðari til óviðkomandi.

Dømi um trúnaðarupplýsingar kunnu vera:

- Privat viðurskifti hjá einstaklinginum
- Innanhýsis viðurskiftir hjá feløgum og virkjum
- Almenn fíggjarlig áhugamál
- Fremjan av almennum eftirliti, tillagingum ella ráðleggingum

Tagnarskyldan stendur við, hóast viðkomandi fer úr starvi og ikki er býráðs- ella nevndarlimur longur.

Lógarásetingar um tagnaðarskyldu

Sambært kapittul 8, § 26, í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 – fyrisitingarlógin – hevur tann, sum virkar innan almennu fyrisitingina tagnarskyldu, jbr. borgarligu revsilógina § 152 og §§ 152c-l52f, tá ein upplýsing við lóg ella aðrari gildari áseting hevur trúnaðarfrámerki, ella tá tað annars er neyðugt at halda hana loyniliga fyri at verja serstøk fyrilit viðvíkjandi almennum ella privatum áhugamálum.

Eisini verður í kapittul 5, § 26 og § 27, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 – kommunustýrislógin – víst fyrilit fyri reglunum um tagnaðarskyldu.

Í samband við umsóknir um skattalætta fáa býráðslimir og ávís starvsfólk, sum ikki arbeiða innan líkningarvaldið/skattavaldið, upplýsingar um inntøku- og ognarviðurskifti o.t. - hjá skattgjaldara, og sambært § 151 í skattalógini frá 1. september 1983 við seinri broytingum er fyrisett tagnaðarskylda undir ábyrgd í borgarligu revsilóg fyri Føroyar, og er bannað at siga óviðkomandi frá upplýsingum.

Sambært § 51 í løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 2017 hava øll, sum útinna tænastu ella arbeiði fyri eina fyrisiting ella stovn eftir lóg um barnavernd ella eru limir í eini barnaverndarnevnd tagnarskyldu sambært kapitli 8 í fyrisitingarlógini.

Undirritaði býráðs- ella nevndarlimur vátti við hesum, at eg eri kunnug/ur við tekstin omanfyri, ið eg havi lisið gjølla, og sum eg ætli mær at halda meg til.

**Navn:** ______________________ Tvøroyri, tann: __________________________

**Bústaður:**___________________ Undirskrift________________________________

**Teldupostur:**________________